## Flokkur á ferð

Javnaðarflokkurin fer nú undir eitt átak, har valdu umboð floksins fáa høvi at greiða veljarunum frá, hvørji úrslit eru rokkin í hesum valskeiðinum, og har veljararnir fáa høvi at siga sína hugsan um avrikini. Tiltakið, sum hevur fingið heitið »Flokkurin møtir veljarunum«, byrjar í arbeiðsmannafelagshúsinum í Leirvík mánakvøldið 5. mars, 7. mars verður tiltakið í Dansistovuni í Vestmanna, og 10. mars verður hildið fram í Skopun.

## Heldur ígjøgnum skattin

Í einari nýggjari lóg um sjúkrakassar, sum kemur fyri Løgtingið í næstum, stendur, at allir limir skulu rinda tað sama og hava somu treytir. Tað fær formannin í Føroya Kommunufelag, Rósu Samuelsen, at skjóta upp, at politikararnir eiga at taka næsta stig, soleiðis at sjúkrakassagjaldið verður goldið umvegis landsskattin. Harafturat mælir hon politikarunum til at lata felags sjúkrakassaskipanina halda til uttan fyri høvuðsstaðarøkið.

Sleppa ikki at velja kommunu:

# Løgtingið sveik fólkið í Ei

**- Eg haldi, at landsins myndugleikar hava skyldu til at geva fólkinum í Eiðis kommunu tveir valmøguleikar, so vit í framtíðini kunnu samráða okkum fram til ta avtalu, sum er best fyri okkum. Meðan Kvívík og Vestmanna fáa tríggjar valmøguleikar, fáa vit ongan, sigur ein undrandi Anfinnur Kruse, borgarstjóri í Eiðis kommunu**



SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Fyri trimum vikum síðan samtykti løgtingið uppskotið hjá landsstýrismanninum, Jacobi Vestergaard, um sjálvbodna kommunusamanlegging.

Sambært løgtingslógini verða sjey sonevnd samstarvsøki í framtíðini. Tey eru Suðuroy, Sandoy, Eysturoy, Suðurstreymoy, Norðoyggjar, Vágar og Sunda kommuna, sum eisini kemur at fevna um Eiðis kommunu.

Eftir tilmæli hjá meirilutanum í rættarnevndini sleppa kommunurnar Vestmanna og Kvívík saman at velja, um tær vilja hoyra til Vágar, Sundalagið ella Suðurstreym.

Semjast kommunurnar ikki um samanlegging, tekur landsstýrismaðurin í kommunumálum avgerðina innan 1. oktober 2009.

Málið um sjálvbodna kommunusamanlegging kom á tingborð í fjør heyst, men eftir triðju viðgerð í løgtinginum stutt fyri jól varð tað beint aftur í rættarnevndina, tí tinglimir hildu ikki, at málið var nóg greitt. Tað var løgtingslimurin, Kári P. Højgaard, sum átti uppskotið um at lata málið fara aftur í nevnd.

### Eiði einki val

Í endaliga uppskotinum, sum løgtingið samtykti, sleppa Kvívík og Vestmanna sum nevnt at velja millum Vágar, Sundalagið og Suðurstreym. Bæði Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin hildu, at Eiðis kommuna eisini eigur at sleppa at velja millum Sundalagið og Eysturoynna, men tað helt løgtingið í endaligu samtyktini so ikki. Tí hevur Eiðis kommuna sambært samtyktu løgtingslógini ongan valmøguleika.

Í dag undra eiðisfólk seg yvir, at fjølmiðlarnir hava gjørt so lítið burtur úr hesum partinum av málinum.

- Løgtingslógin um sjálvbodna samanlegging sigur, at vit bert hava ein møguleika. Skulu vit leggja saman, skal tað verða við Sunda kommunu. Vit halda, at minsta kravið hjá okkum í kommununi má vera, at vit hava tveir møguleikar – Sunda kommunu og Eysturoynna, um vit yvirhøvur skulu leggja saman. Vit halda, at hetta »luktar« av politikki, siga fólk í Eiðis kommunu, sum Sosialurin hevur tosað við.

### Borgarstjórin samdur

Borgarstjórin í Eiðis kommunu, Anfinnur Kruse, er púra samdur við fólki í Eiðis kommunu um, at skal kommunan í framtíðini leggja saman, eigur fólkið í øllum førum at hava tveir møguleikar.

- Eg haldi slett ikki, at fólk í kommununi ganga og hugsa um samanlegging, og tað ger bygdaráðið heldur ikki. Men verður tað so, at vit verða trýstir til samanlegging, hevur tað stóran týdning fyri okkum, at bygdaráðið fær møguleikan at samráða seg til tveir sáttmálar, sum fólk síðan kunnu taka støðu til á eini fólkaatkvøðu. Málið fer sjálvandi eisini at snúgva seg um, hvar Eiðis kommuna røkkur bestu avtaluni. Tí eri eg púra samdur við teimum, sum halda, at fólkið í kommununi eigur at hava meira enn tann eina møguleikan – ikki minst sæð í ljósinum av, at Kvívík og Vestmanna hava tríggjar valmøguleikar.

### Undrunarvert

Anfinnur Kruse sigur, at landsstýrið í sambandi við hetta lógararbeiðið sendi út eitt hoyringsskriv til kommunurnar um sjálvbodna samanlegging.

- Í svarskrivinum, sum vit sendu innlendismálaráðnum, søgdu vit okkum fegnast um, at landsstýrið ikki legði upp til tvungna samanlegging, men vit søgdu okkum samstundis undrast yvir, at teir høvdu valt at taka Eiðis kommunu burtur úr Eysturoynni, sum kommunan er ein náttúrligur partur av.

Borgarstjórin vísir á, at í tí fyrsta upplegginum skuldu bæði Eiðis kommuna og Funnings kommuna leggja saman við Sunda kommunu, men seinni varð Funnings kommuna so tikin burtur úr og fær møguleikan at leggja saman við Eysturoy.

- Jú, eg má siga, at hetta tykist okkum rættiliga undrunarvert, og vit duga ikki at skilja, hvat liggur aftanfyri hetta mál.

Anfinnur Kruse sigur seg ikki duga at meta, hvønn veg fólk í Eiðis kommunu vildu farið, um ein samanlegging gjørdist aktuell, og hann vil heldur einki siga um, hvønn veg hann heldur, at bygdaráðið hellir í hesum máli.

### Góð kommuna

- Vit hava eina væl rikna og væl útbygda kommunu, sum hevur at kalla allar fasilitetir, og tí hava vit slett ikki gjørt okkum nakrar tankar um samanlegging við aðrar kommunur. Vit klára okkum sjálvi, men saman standa kommunurnar sjálvandi sterkari.

Hann leggur aftrat, at Eiðis kommuna hevur samstarv við Sunda kommunu um felagsskúlan á Oyrarbakka og um lækna og barnavernd. Hinvegin samstarvar kommunan við hinar kommunurnar í Eysturoy um eitt nú Røktar-og Ellisheimið í Runavík.

Borgarstjórin vísir hinvegin á, at tað fara nógv ting fram í Sunda kommunu í dag, sum Eiðis kommuna slett onga ávirkan hevur á.

- Eg haldi, at landsins myndugleikar hava skyldu